# Páskakonsert uttan Guðrun



*Terji Rasmussen og All That Rain spæla á páskakonsertini í Fuglafirði leygarkvøldið*

**All That Rain og Terji Rasmussen spæla til stóru páskakonsertina í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, men Guðrun Jacobsen hevur verið noydd at avlýsa sína luttøku**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Leygarkvøldið verður páskakonsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Trý nøvn standa á plakatini, men eitt teirra hevur nú avlýst.

Tað er Guðrun Sólja Jacobsen, sum ikki hevur stundir at vera í Fuglafirði leygarkvøldið. Orsøkin er ikki, at hon ikki hevur hug, men hinvegin at hon er bundin at nøkrum sáttmálum, nú hon vann Stjørna í eitt kvøld.

Guðrun royndi til tað seinasta at finna ein møguleika fyri at vera við, tí hon vil ikki svíkja sínar føroysku áhoyrarar, men tað bar ikki til.

Føroyingar verða tó ikki snýtti fyri Guðrun, tí í næstum kemur hon til Føroya at syngja á einum Stjørna í eitt kvøld-tiltaki, og tá verða konsertir bæði í Mentanarhúsinum og í Norðurlandahúsinum.

### Annað á skránni

Tað verður tó góður tónleikur at hoyra á páskakonsertini í Fuglafirði leygarkvøldið.

All That Rain og Terji Rasmussen fara at spæla, og hesi bæði nøvn eru kend fyri at spæla væl og lívliga.

Terji Rasmussen hevur tónleikarar sum Rógva á Rógvu, Hjalta Joensen og Paula Magnussen afturat sær, og í All That Rain er tað nú Pól Arni Holm, sum er frontmaður.

Konsertin byrjar leygarkvøldið kl. 23.00.


**Bilførari**

Vit søkja eftir bilførara/servicumanni at byrja skjótast tilber.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Arbeiði umfatar í høvuðsheitum:**
- avskipað og koyra vindeygu og hurðar út til kundan
- at taka mát og vegleiða kundan á staðnum
- servicera og gera smáar umvælingar

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert fyrikomandi og álitandi
- at tú hevur royndir við timbur/snikkaraarbeiði
- at tú hevur koyrikort, evt. stóra koyrikortið
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt

**Løn:**
Løn verður sambært avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen tel. 33 21 77 ella 21 81 15

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax. 33 31 68
E-mail: vs-fg@h-window.fo · Homepage: www.h-window.fo





Tillukku

Enmaco Motorer A/S og P/F Alma ynskja Smyril Line og Flender Werft tillukku við nýbygningi 694 "Norröna" og við valinum av 4 stk. MaK 6M43 høvuðsmotorum, 2 stk. MaK 9M20 hjálpimotorum og 1 stk. MaK 6M20 hjálpimotori.

P/F ALMA Maskinverkstaður & Smiðja · enmaco motorer · CAT MaK

Enmaco Motorer A/S · Øresundsvej 9 · DK-6715 Esbjerg N · Tlf. +45 76 14 64 00 · Fax +45 76 14 64 01 · www.enmaco.dk
Enmaco Motorer A/S · Avedøreholmen 70 · DK-2650 Hvidovre · Tlf.+45 36 88 01 00 · Fax +45 36 88 01 01
P/F ALMA Maskinverkstaður & Smiðja · á Hjalla 15 · FO 110 Tórshavn · Tlf +298 31 58 90 · Fax +298 31 04 68 · www.alma.fo

RAGNAR MAGNUSSEN
Timbur- & snikkaraarbeiði
t.d.
Umvælingar
Skifting av tøkum
Húsavørðsarbeiði
tel. 51 89 02






# Kakuskipið Norröna

**Í sambandi við at nýggja Norröna kom til landið hósdagin, lat Ferðaráð Føroya Smyril Line eina køku við mynd av Norrönu á**

NORRÖNA
*Solby A.Eliasen*

Tað er bakaríið hjá Símuni í Klaksvík, sum hevði bakað køkuna. Talan er um eina vanliga lagkøku, umleið 60cm x 40cm, við marsipani útyvir. Heilt vanlig er hon tó ikki, tí ístaðin fyri rómapynt ella annað, er tað ein mynd av nýggju Norrönu, sum prýðir flatan á køkuni. Og tað sum er so serligt við tílíkum myndum er, at tær verða prentaðar á sokallað sukurpappír, sum er etandi.

Blekkið í prentaranum er sukur blandað við fruktfarvu, kann ein í stuttum siga. Og tá so myndin er komin á køkuna, sær tað serstakliga flott út, tí myndin sær út sum ein ordilig mynd.

Símun Akursmørk hevur sum sagt bakað køkuna, og hann sigur, at tað sjálvandi veldst um góðskuna á myndini.

– Betur myndin sær út, betur verður hon á køkuni. Tað sigur seg sjálvt, greiðir hann frá.

Spurdur um, hví tað man vera, at Ferðaráð Føroya bíleggur eina køku úr Klaksvík til nýggju Norrönu, sigur Símun, at hann ikki heldur, at tílíkar myndakøkur fáast longur í høvuðsstaðnum.

– Tey høvdu hoyrt, at vit vóru byrjað at gera tær aftur, og so bíløgdu tey, sigur hann og leggur afturat, at tá fólk bíleggja aðrastaðni frá, so er bara at senda eina mynd umvegis teldupost til Bakaríið hjá Símun. So verður køkan gjørd, og um ein til dømis býr í Havn, so hevur Símun møguleika til at senda køkur til Havnar tríggjar ferðir um vikuna.

Tað, sum er so gott við eini tílíkari køku við marsipani, er, at hon uttan trupulleikar kann halda sær í ein ella tveir dagar.

– Tað ger onki fyri køkuna, um hon stendur í ein dag ella tveir, so tí tað er tað gott, at vit kunnu senda suður til Havnar, sigur Símun, sum leggur afturat, at tá fólk bíleggja tílíkar køkur, kunnu tey fáa tað, sum tey vilja hava.

Símun hevur fyri stutt síðani tikið uppaftur bakingina av myndakøkum. Einu tíðina var tað sera nógv, men orsakað av ymiskum tekniskum trupulleikum, valdi hann at steðga. Men nú eru so trupulleikarnir loystir, og hann bakar aftur myndakøkur til fólk allastaðni í landinum.



*Køkan, sum Bakaríið hjá Símun í Klaksvík, lat senda suður til Smyril Line hósdagin. Ferðaráð Føroya hevði bílagt. Køkan var umleið 60cm x 40cm til støddar*

Mynd: SáH



*Símun hevur fyri stutt síðani tikið uppaftur bakingina av myndakøkum. Einu tíðina var tað sera nógv, men orsakað av ymiskum tekniskum trupulleikum, valdi hann at steðga. Men nú eru so trupulleikarnir loystir, og hann bakar aftur myndakøkur til fólk allastaðni í landinum.*

Mynd: SáH





SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

KVASIR bjóðar





Nýggjar TELDUKOYRIKORT-røðir á KVASIR





Byrja í mai.
Kom á skeið eina ferð um vikuna.
Vel ímillum mánamorgun ella mikudag seinnapart í hugnaliga umhvørvinum á KVASIR





Kostnaður 9.900,00
- uttan provtøkur
- um tú teknar teg til allar sjey partarnar





Nærri lýsing um ymisku partarnar (modulini) er á heimasíðu okkara www.kvasir.fo
ella ring og fá meira at vita á tlf. 320 204

Tel 320 204
http://kvasir.fo